


# Fýra kappast um tvey pláss

## Seinastu árini er staðfest, at tað er torført hjá uppflytarum at standa seg eftir uppflyting úr næstbestu deildini

Øll vilja kappast, har tað er hugaligast at vera. Bara fýra feløg í 1. deild hava møguleika at flyta upp. Tey eru VB/Sumba og AB, sum fluttu niður úr Formula deildini síðsta summar, og TB og 07 Vestur.

07 Vestur er nýggja felagið í Vágum. Dreymurin at Vágar aftur skulu eiga sín lut í fremstu røð. Nýggjur venjari er Piotr Krakowski. Hnn er ein av útlendsku venjarunum, sum tað hevur hilnast best hjá í Føroyum. Í ???? vandi hann FSVágar. Tá var úrtøkan ikki so góð, tí liðið flutti niður. Seinastu árini hevur Piotr í EB/Streymi víst, at hann er væl førur fyri at skapa góð úrslit, og nú skal tað vísa seg, um teir í Vágum eru nóg stinnir at flyta upp.

Í fjør royndi AB seg fyrstu ferð í fremstu røð. Nú er AB aftur í næstbestu deildini. Allan Mørkøre, sum seinna partin av árinum var ein av stuðulsspælarunum, hevur fingið ábyrgdina av at vinna uppflyting. Á Argjum verður mett sum sjálvsagt, at teirra lið skal vera partur av Formula deildini.

Í Suðuroy var í fjør nógv tosað um at leggja bestu fótbóltsliðini í oynni saman. Fundast varð um hetta, men tað spurdist einki burturúr, og nú verður bæði í Vági og á Tvøroyri enn eina ferð roynt at vinna uppflyting. Í Vági verður arbeitt við nýggjum ættarliði, sum tey síðstu árini, áðrenn niðurflytingina í fjør, hevur verið við til at manna besta liðið. Tað er ein av teimum, sum vóru við til at vinna fyrsta og einasta FM heitið til VB í 2000, Jón Pauli Olsen, ið hevur ábyrgdina.

Á Tvøroyri er Krzystof Popczynski sigursvandur venjari, og nógvir av spælarunum, sum eru á TB liðnum, hava verið við í nógv ár.

Tvey av hesum fýra fara at flyta upp. Tað er undan kappingarbyrjan sannlíkt, tí hini seks hava ikki loyvi at flyta upp, tí tey longu eru umboðað í bestu deildini. Um tey skulu flyta upp, so er onnur treytin, at tey vinna annað av fremstu plássunum, og hin treytin er, at liðið, sum felagið hevur í bestu deildini, endar á øðrum av tveimum teimum niðastu plássunum.

Úrslitini tey seinastu árini hava víst, at feløgini, sum eru flutt upp í Formula deildina, hava torført við at halda tørn um plássið. Í fjør vóru AB og B71 nýggj lið í bestu deildini. Bæði vórðu undan kappingarbyrjan roknað sum kandidatar at flyta niður. Sandoyingar gjørdu spádómunum til skammar og vístu harvið teimum, sum droyma um at flyta upp, at tað ber til at býta seg fastan.

Hóast AB, 07 Vestur, TB og VB/Sumba hava teirra bestu manning í næstbestu deildini, og hini feløgini eru umboðað í 1. deild av teirra næstbestu feløgum, so vísa royndirnar, at fleiri av hesum liðunum eru so mikið væl mannað, at tey kunnu taka stig frá øllum og eisini vinna heiðursmerkir. Eyðkenni fyri hesi liðini er tó, at tey ikki hava somu manning alla tíðina, og at tey ofta eru betri mannað og standa seg betur á heimavølli, enn tey gera á útivølli.

Samanleggingar hava havt við sær, at deildin sær øðrvísi út, enn hon tóktist skula gera við kappingarlok í fjør. GÍ og LÍF hava lagt saman í Víking, sum fer at hava heimavøll í Leirvík, og SÍ og FSVágar 04 hava lagt saman í 07 Vestur. Tað bar við sær, at KÍ, sum endaði næstaftast í fjør, heldur fram í deildini, og at EB/Streymur er flutt upp í 1. deild.